LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

TAKS
Postboks 2151
Smyrilsvegur 20
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 25. februar 2021
J.Nr.: LUM-16- 21/01545-17
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr. 20/41223

**Skriv til Taks um vantandi upplýsingar á einum áminningarskrivi**

Í klaguni frá A, dagfest 21. januar 2021 varð klagað um, at Taks sendi áminningarskriv fyri eitt krav um eftirlønargjald av uttanlandainntøku frá 2019, hóast Taks í november 2020, í sambandi við eitt annað klagumál hjá honum, boðaði umboðsmanninum og honum frá, at talanum var um ein feil, sum varð rættaður, og at rokningin fyri 2019 varð strikað.

Taks hevur í skrivi til mín greitt frá, at Taks hevur haft nakrar tekniskar avbjóðingar, og at hetta var grundin til, at eitt áminningarskriv varð sent til klagaran av órøttum. Sambært Taks er eftirlønarrokningin fyri 2019 nú strikað, og skriv er sent til klagaran um hesi viðurskifti.

Eg havi í hjálagda skrivi boðað klagaranum frá, at eg haldi, at grundarlag er ikki fyri at gera meira við sjálva klaguna.

Í samband við klagumálið bað eg Taks um frágreiðing um ávís formlig viðurskifti við áminningarskrivinum, so sum hví eingin undirskrift var á áminningarskrivinum, og hví tað ikki var upplýst, hvat tíðarskeið kravið stavaði frá.

*Undirskrift á skrivum frá almennum myndugleikum*
Viðvíkjandi spurninginum um vantandi undirskrift á áminningarskrivinum, hevur Taks greitt frá, at skriv frá Taks, ið verða send beinleiðis frá Elektron, hava ikki undirskrift. Hetta eru eitt nú skattauppgerðir, kontoavrit, uppgerð av lønarhæddaravgjaldi, áminningarskriv v.m., meðan onnur skriv frá TAKS hava øll eina persónliga undirskrift. Taks hevur víst á, at um áminningarskrivini skulu vísa til ein persón, vildi hetta viðført, at hesi máttu avgreiðast manuelt og vildi viðført nógv eyka arbeiði og nógvan eyka kostnað.

Øll skriv frá almennum myndugleikum, sum eru at meta sum avgerðir, eiga sambært góðum fyrisitingarsiði at verða undirskrivað. Tá talan er um skriv, sum ikki broyta rættarstøðuna hjá einum borgara, so sum kontoavrit og áminningar, kann tað eftir umstøðunum í málinum vera nøktandi, at almenni myndugleikin stendur sum avsendari, og at skrivini eru uttan persónliga undirskrift frá starvsfólki hjá viðkomandi myndugleika. Í slíkum førum er tó neyðugt at skrivið hevur so mikið nøktandi upplýsingar um myndugleikan, at móttakarin greitt og lættliga kann síggja, hvussu hann kann seta seg í samband við myndugleikan.

Í ítøkiliga málinum var á áminngarskrivinum upplýst um navn, postrúm, bý og telefonnummar hjá Taks. Hinvegin var eingin upplýsing um gøtunavn, hóast hetta er viðkomandi, um borgarin ynskir at møta á skrivstovuni hjá Taks um skrivið, hann hevur móttikið. Ei heldur varð upplýst um nakra teldupostadressu, sum borgarin kundi samskifta umvegis, um hann ynskti tað. Tað eigur ikki at áliggja borgaranum at finna hesar upplýsingar, so hann kann nýta tann samskiftisshátt, sum passar honum best. Hetta eru upplýsingar, sum eiga at vera á einhvørjum skrivi frá einum almennum myndugleika. Eg fari tí at heita á Taks um at gera neyðugar broytingar, so adressuupplýsingar á skrivum frá Taks verða nøktandi.

*Págreinan av kravinum*
Í áminningarskrivinum varð upplýst, hvat slag av eftirstøðu, talan var um, men hóast skjalið hevði ein teig viðvíkjandi árstali, var einki upplýst um, hvat tíðarskeið kravið stavaði frá.

Taks hevur upplýst, at stovnurin hevur tvær skipanir, bókhaldsskipanina BO og konteringsskipanina KO, sum eru grundarlag fyri teirra innkrevjingarskipan IK. Krøvini úr KO eru býtt sundur uppá ár, meðan krøvini úr BO ikki eru býtt í ávís tíðarskeið, men eru upplýst sum ein samlað saldo í innkrevjingarskipanini. Hetta er galdandi fyri eitt nú skuld av eftirløn og mvg skuld. Tað ber tó altíð til hjá starvsfólkunum á Taks at kanna og upplýsa, hvat kravslag og tíðarskeið talan er um.

Taks hevur eisini greitt frá, at tað krevur umfatandi broytingar í skipanini, um krøv m.a. sum hetta um eftirløn av B- inntøku, skulu verða býtt í ár og ikki bara verða upplýst, sum ein samlað saldo úr bókhaldsskipanini BO og innkrevjingarskipanini IK.

Ein upplýsing um, hvat tíðarskeið eitt krav er frá, er altíð viðkomandi, tá talan er um eftirstøðu, bæði tí hetta er avgerandi fyri spurningin um fyrning av kravinum og annars fyri greidleikan í málinum sum heild. Tá áminningarskrivið hevur ein teig viðvíkjandi árstali, men ikki inniheldur eina tilskilan um, hvat tíðarskeið skuldin er frá, haldi eg, at áminningarskrivið hevur ikki tann neyðuga greidleikan, ið slík skriv frá einum almennum myndugleika eiga at hava. Tá talan samstundis er um vantandi upplýsing av so týðandi viðurskiftum, sum hvat tíðarskeið eitt krav er frá, fari eg at heita á Taks um at tillaga hetta slagi av áminningarskrivum, so tey gerast greiðari.

Eg fari at biðja Taks lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Skrivið verður í næstum lagt á heimasíðu okkara lum@lum.fo í navnleysum líki.

Vinarliga

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður